Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	29. sept. 2023
Mál nr.:	23/18109-15
Málsviðgjørt:	HP
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	22.09.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur
(Stuðul til bil broyttur til stuðul til serligan útbúnað til bil)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 12. desember 2020, § 11 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2022 og § 6 í løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023, verður § 26 orðað soleiðis:

"**§ 26.** Stuðul til serligan útbúnað til bil verður veittur persóni, ið hevur varandi virkistarn, tá bilur:
1) er neyðugur fyri, at persónurin kann koma til og frá arbeiði ella útbúgvingarstaði,
2) munandi bøtir um avleiðingarnar av skerda virkisførinum hjá persóninum, ella
3) munandi lættir um gerandisdagin hjá persóninum.

Stk. 2. Stuðul sambært stk. 1 verður bert veittur, um Akstovan krevur serliga útbúnaðin.

Stk. 3. Kostnaðurin av serligum útbúnaði, ið stuðul verður veittur til sambært stk. 1, kann ongantíð vera hægri enn helvtin av virðinum av bilinum, um bilurin er eldri enn 3 ár.

Stk. 4. Hevur virkistarnið við sær, at tørvur er á kassabili fyri at lúka treytirnar um flutning sambært stk. 1, verður stuðul eisini veittur at keypa kassabil. Fíggjarligur stuðul til kassabil verður veittur sum:
1) rentufrítt lán upp á 219.555 kr., og
2) rentufrítt og avdráttarfrítt lán upp á eina upphædd svarandi til munin millum 219.555 kr. og kostnaðin av bilinum.

Stk. 5. Stuðul verður veittur til meirútreiðslur til vektgjald til bil við eginvekt oman fyri 1300 kg, ið er skrásettur áðrenn 1. januar 2017. Hetta er eisini galdandi, verður bilurin endurskrásettur eftir 1. januar 2017.

Stk. 6. Stuðul verður veittur til meirútreiðslur til umhvørvisgjald á bili við

CO_2 útláti oman fyri 120 gramm pr. kilometur.
Stk. 7. Persónur, sum lýkur treytirnar sambært stk. 1 ella 4, kann fáa stuðul til meirkostnað í sambandi við at taka koyrikort og endurnýggjan av koyrikorti.
Stk. 8. Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um:

1) treytir og umstøður fyri at fáa stuðul sambært stk. 1 og 4,
2) afturrindan av láni, undir hesum freist fyri afturgjaldi og treytir fyri at eftirgeva lán umframt inntøkugrundarlagið í sambandi við afturgjaldið,
3) møguleikan at fáa stuðul til at skifta út bil, ið stuðul er veittur til sambært stk. 4,
4) stuðul til neyðuga innrættan o.a.,
5) í hvønn mun stuðul kann veitast til at gjalda koyrifrálæru o.a.,
6) treytir fyri at játta stuðul til vektgjald ella umhvørvisgjald eftir stk. 5 og 6,
7) stuðul til persón, ið flytur til Føroyar og lýkur treytirnar í stk. 4, og sum hevur bil við, og
8) árliga prístalsjavning av upphæddini sambært stk. 4.”

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.
Stk. 2. Umsóknir um stuðul, sum ikki eru avgreiddar, tá hendan løgtingslógin kemur í gildi, verða viðgjørdar og avgreiddar sambært higartil galdandi reglum.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Almenni útreiðsluvøksturin skal tálmast. Sum partur av sparitiltøkum í sambandi við fíggjarlógina 2024 er ætlanin at herða treytirnar fyri at fáa til stuðul til bilar til fólk, sum hava virkistarn. Samstundis er talan um eina tillaging av skipanini til nútíðarsamfelagið. Persónbilur er í dag mettur at vera ein vanligur brúkslutur, sum flest øll fólk hava ella hava møguleika at ogna sær, og tí verður frameftir bert veittur stuðul til møguligan serligan útbúnað umframt stuðul til kassabilar.

Tá ið talan er um stuðul til ymiskar útreiðslur, so er grundreglan um kompensasjón bert viðkomandi fyri tær meirútreiðslur, ið standast av virkistarninum, og er ikki viðkomandi fyri tær útreiðslur, sum viðkomandi persónur annars hevði havt.

1.2. Galdandi lóggáva

Persónar, sum hava varandi virkistarn, kunnu undir ávísum treytum fáa stuðul til keyp av bili. Talan skal vera um, at virkistarnið skal avmarka møguleikarnar at ferðast, og talan skal vera um, at bilurin er neyðugur fyri at fáa ella halda fast um eitt arbeiði ella útbúgving. Stuðul verður bæði veittur til bilar við serútgerð og til vanligar bilar (t.v.s. bil, sum ikki hevur serútgerð). Treytin er, at persónurin er tarnaður soleiðis, at hann ikki kann brúka almenna samferðslukervið og tískil er tongdur at bili fyri at kunna flyta seg.

Ein persónur, sum eigur bil, og fær staðfest eina varandi sjúku ella virkistarn, ið skerjir hansara møguleikar at flyta seg, kann sambært galdandi reglum selja sín bil, fyri síðani at fáa stuðul at keypa nýggjan bil. Tað er sambært Almannaverkinum ikki óvanligt, at hetta kemur fyri.

Stuðulin verður veittur sum eitt rentufrítt lán upp á í mesta lagi 219.555 kr. Tað er kunngerð nr. 16 frá 6. mars 2007 um stuðul til at keypa bil o.a., sum ásetir, hvussu stuðulin er settur saman, og hvussu stórur partur skal gjaldast aftur. Sambært galdandi kunngerð er tað, sum verður goldið aftur, treytað av inntøkugrundarlagnum hjá umsøkjara. Meginreglan er, at hjá teimum, sum hava inntøkur lægri enn 3 ferðir grundupphæddina fyri ein stakan fyritíðarpensjónist, svarandi til 224.316 kr. í 2023, er helvtin av stuðulsupphæddini afturgjaldsskyldug, meðan hin helvtin verður niðurskrivað. Tann afturgjaldsskyldugi parturin hækkar síðani stigvíst, tá inntøkan er hægri enn 224.316 kr.

Í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur stendur, at rentufría lánið er 180.000 kr. Upphæddin varð sett í gomlu forsorgarlógina í 2007 og er síðani javnað árliga. Í sambandi við at forsorgarlógin fór úr gildi, og løgtingslógin um almannatrygd og tænastur kom í staðin, vórðu ásetingarnar um stuðul til bil við smávegis broytingum fluttar yvir í nýggju lógina. Av misgáum var upprunaliga upphæddin á 180.000 kr. sett í lógina – ikki tann javnaða upphæddin. Tað hevur tó øll árini verið tann javnaða upphæddin, sum hevur verið brúkt. Javnaða upphæddin er sum nevnt 219.555 kr. í 2023.

Tey, sum hava serligar umstøður og tí hava tørv á aðrari loysn enn einum vanligum bili, kunnu fáa stuðul til dýrari bil. Í hesum førum verður stuðul veittur sum rentu- og avdráttarfrítt lán til kostnaðin av tí partinum, sum fer upp um 219.555 kr. Tað kemur fyri, at persónar fáa stuðul til dýrari bil, tí tað í nøkrum førum kann vera trupult at finna bilar, ið eru bíligari enn 219.555 kr.

Harumframt eru nógv, sum fáa stuðul til sokallaðan kassabil. Tað eru koyristólsbrúkarar og familjur við børnum við fjølbreki.

Tað eru vanliga umleið 35 umsóknir um árið um stuðul til bil, harav gott triðingurin er um stuðul til vanligan bil. Tað eru umleið 60 prosent av umsøkjarunum, sum fáa játtað stuðul til bil. Tá umsøkjari ikki fær stuðul játtaðan, er tað lutvíst orsakað av, at umsøkjari ikki lýkur treytirnar, og lutvíst tí, at umsøkjari tekur umsóknina aftur.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at tálma útreiðsluvøkstri landskassans. Heldur enn at veita stuðul til bil, kann frameftir verða veittur stuðul til serligan útbúnað, sum er neyðugur fyri, at fólk við virkistarni kunnu koyra ein bil. Tey, sum hava serligar umstøður og tí hava tørv á kassabili, fara framhaldandi at fáa stuðul.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Skipanin við stuðli til bil verður broytt soleiðis, at tað frameftir ikki verður veittur stuðul til sjálvan bilin, tá talan er um vanligan bil. Stuðul verður tó framhaldandi latin til serligan útbúnað og til umbygging av bilum.

Í mun til grundregluna um endurbót, eigur stuðul bara at verða veittur í mun til tær meirútreiðslur, ið standast av virkistarninum, og ikki fyri tær útreiðslur, ið viðkomandi persónur annars hevði havt. Ein persónbilur er í dag at meta sum ein vanligur brúkslutur, ið nógv hava ella hava góðan møguleika at ogna sær. Hetta verður endurspeglað í stuðlinum soleiðis, at endurbót ikki verður veitt til bilin sjálvan sum brúkslut, men heldur tær meirútreiðslur, ið eru neyðugar í mun til virkistarnið og bilin, ið viðkomandi persónur skal hava.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er eitt fylgilógaruppskot til fíggjarlógaruppskotið fyri 2024, og tað hava ikki verið stundir at senda uppskotið til ummælis. Lógarteknisku ásetingarnar hava verið viðgjørdar saman við Almannaverkinum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Tað kann ganga ógvuliga long tíð frá umsókn, inn til bilurin er klárur hjá umsøkjaranum at brúka, m.a. orsakað av drúgvari veitingartíð, umbyggingartíð o.a. Talið á umsóknum um stuðul er ymiskt frá ári til ár, og tað hevur við sær, at tað ikki ber til neyvt at meta um fíggjarligu avleiðingarnar fyri tað einstaka árið.

Ein játtan til vanligan bil kostar landskassanum vanliga umleið 120.000 til 150.000 kr., umframt útreiðslur til umbygging og serligan útbúnað. Í upphæddini er hædd tikin fyri, at borgarin rindar ein part av kostnaðinum av bilinum. Seinastu 4½ árið hava 32 fólk fingið játtað stuðul til vanligan bil. Við støði í hagtølunum síðstu 4½ árið verður mett, at uppskotið hevur við sær, at útreiðslur landskassans fara at lækka við umleið 1 mió. kr. árliga.

Hóast hetta uppskotið verður samtykt, fer landið eisini frameftir at hava útreiðslur til stuðul til bil. Tað verður framhaldandi veittur stuðul til kassabilar, til serligan útbúnað og umbygging av bilum.

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur við sær minkandi umsiting fyri landið. Tað verða færri, sum fara at søkja um stuðul til bil. Talan er um umsitingarliga sera tunga málsviðgerð, tí upplýsingar frá ymiskum myndugleikum og læknaváttanir skulu fáast til vegar, tilboð frá ymiskum bilasølum skulu fáast til vegar, bilar skulu roynast o.s.fr.

Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur við sær, at persónur við varandi virksitarni ikki fer at hava rætt til stuðul til vanligan bil.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður ikki, at uppskotið er í andsøgn við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar – heldur ikki sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Persónur, ið ber brek, fer framhaldandi at hava rætt til stuðul til meirútreiðsluna, sum brekið hevur við sær.

2.9. Markaforðingar
Danska forsætismálaráðið hevur eitt yvirlit yvir markaforðingar í ríkisfelagsskapinum. Í hesum yvirlitinum stendur ein markaforðing at vera avmarkingar í flytførinum hjá persónum við avlamisbili, sum flyta millum Danmark og Føroyar. Talan er um sera fá mál, og tað er ikki á hvørjum ári, at tað kemur fyri.

Forðingin er, tá persónur flytur úr Føroyum til Danmarkar, og ikki øvugt. Tað eru dømi um, at danskir myndugleikar ikki vilja yvirtaka skyldurnar í einum bili hjá persóni, sum flytur úr Føroyum til Danmarkar. Føroyska lóggávan tekur hædd fyri, at persónur við avlamisbili flytur úr Danmark til Føroyar. Hetta uppskotið hevur við sær eina avmarking í stuðli til bil, og sostatt verða enn færri persónar, sum fara at flyta til Danmarkar við bili, og harvið verða færri, sum fara at møta markaforðingini. Hinvegin fer føroyski myndugleikin frameftir ikki at yvirtaka skyldurnar frá donskum myndugleikum í sambandi við flyting til Føroyar við vanligum bili, sum stuðul er veittur til. Hetta tí at ein tilflytari skal hava somu rættindi sum ein herbúgvandi.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Sambært § 26, stk. 6 í galdandi løgtingslóg um almannatrygd og tænastur hevur landsstýrisfólkið heimild at áseta nærri reglur. Sambært hesum uppskoti verður heimildin flutt frá stk. 6 til stk. 8. Heimildarásetingin er tillagað hesum uppskoti og tekur atlit til tær avmarkingar, sum hetta uppskotið hevur við sær. Sostatt verður eisini neyðugt at tillagað kunngerð nr. 16 frá 6. mars 2007 um stuðul til at keypa bil o.a.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
§ 26, stk. 1
Stk.1 er orðað soleiðis, sum Almannaverkið higartil hevur umsitið skipanina. Tað merkir, at treytirnar fyri at fáa stuðul eru ikki broyttar í mun til higartil galdandi reglur.

Í higartil galdandi áseting stendur, at persónur við varandi avmarkaðum likamligum ella sálarligum førleika kann fáa stuðul til bil. Í hesum uppskoti er orðingin broytt til "persónur við varandi virkistarni kann fáa stuðul...". Broytingin hevur ikki annað endamál enn at nútímansgera málið. Tað merkir, at málbólkurin er tann sami, og tað er sama meting, sum Almannaverkið skal fremja. Tørvur á flutningi er eisini óbroyttur í mun til higartil galdandi reglur. Tó er orðingin "... skerjir møguleikarnar at ferðast" strikað, tí at ferðast er í hesum sambandi eitt ógreitt hugtak.

Í higartil galdandi lóg verður stuðul veittur til vanligan bil umframt serligan útbúnað, um tørvur er á tí. Eisini verður sambært galdandi lóg eisini veittur stuðul til umbygging av bilinum. Broytingin við hesum uppskotinum er, at Almannaverkið ikki longur fer at kunna veita stuðul til sjálvan bilin, um talan er um vanligan bil. Almannaverkið fer tó framhaldandi at kunna veita stuðul til serliga útbúnaðin og at seta útbúnaðin í bilin og tær útreiðslur, sum fylgja við. Tað merkir, at stuðulin eisini frameftir fevnir um umbygging av bilinum.

§ 26, stk. 2
Stuðulin til eyka útbúnað fer bert at verða veittur, um Akstovan krevur serliga útbúnaðin – eitt nú við átekning á koyrikortið.

§ 26, stk. 3
Ásetingin hevur til endamáls at fyribyrgja, at landið brúkar stórar upphæddir at umbyggja eldri bilar. Kostnaðurin av serliga útbúnaðinum og umvælingini kann ikki vera hægri enn helvtin av virðinum av bilinum, um bilurin er eldri enn 3 ár.

§ 26, stk. 4
Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og virkistarnið hevur við sær, at tørvur er á størri bili í sambandi við flutning, kann stuðul veitast til at útvega kassabil. Við kassabil er at skilja bussar í ymsum støddum.

Í galdandi lóg er ásett, at stuðulin til størri bil verður veittur sum munur millum 180.000 kr. og kostnaðin av dýrara bilinum. Upphæddin á 180.000 kr. varð sett í gomlu forsorgarlógina í 2007, og hevur upphæddin verið javnað øll árini síðani tá. Tá løgtingslógin um almannatrygd og tænastur varð fyrireikað í 2019, vórðu ásetingarnar um stuðul til bil við smávegis broytingum fluttar úr forsorgarlógini til løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Av misgáum varð tann upprunaliga upphæddin á 180.000 kr. sett í løgtingslógina og ikki javnaða upphæddin. Hetta uppskotið rættar feilin.

§ 26, stk. 5 og 6
Stk. 5 staðfestir galdandi siðvenju, har Almannaverkið játtar stuðul til meirútreiðslur til vektgjald, tá ið talan er um bilar oman fyri 1300 kg. Við hesi áseting er brúkari av stórum bili javnsettur við brúkara av vanligum bili, og sostatt er ikki ivamál um, hvørt heimild er at játta stuðul til meirútreiðslur fyri vektgjald. Talan er um bilar, ið eru skrásettir áðrenn 1. januar 2017 ella endurskrásettir eftir 1. januar 2017. Ein bilur er endurskrásettur, tá ið hann er tikin úr føroysku akfarsskránni og síðani er skrásettur aftur.

Stk. 6 er grundað á sama sjónarmið, ið ger seg galdandi í stk. 5, men ger greitt, at stuðul verður veittur til meirútreiðslu til umhvørvisgjald á bilum, fevndir av skipanini um umhvørvisgjald.

§ 26, stk. 7
Persónur, sum lýkur treytir til stuðul til bil sambært stk. 1 og 4, kann fáa stuðul til meirútreiðslur í sambandi við at taka koyrikort og at endurnýggja koyrikort.

§ 26, stk. 8
Sambært stk. 8 kann landsstýrisfólkið áseta nærri fyrisitingarligar reglur um treytir og umstøður at fáa stuðul, afturrindan av láni, treytir fyri at játta stuðul til vektgjald og umhvørvisgjald o.a.

Til § 2
Gildiskoma.

Umsóknir, sum eru móttiknar av Almannaverkinum, og sum ikki eru avgreiddar, tá hendan løgtingslógin kemur í gildi, verða viðgjørdar eftir higartil galdandi reglum.

Almanna- og mentamálaráðið, 29. september 2023

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur